# BFF = BVA
## = BESTU VINIR ALTÍÐ

## SPURNINGAR:

### 1 Er vinurin høgrhentur ella lámur? *(IKKI LÚRA)*

**A.** Høgrhent/ur

**B.** Lám/ur

**C.** Bæði, hann/hon dugir líka væl við báðum hondum

### 2 Hvat er 100% yndis-kipssmakkurin hjá tínum BVA?

**A.** Klassikarin hvørja ferð er: ____________________

**B.** Eg veit ikki, hann/hon koyrir í seg, bara tað er kips!

**C.** Honum/henni dámar ikki kips

### 3 Hvat er millumnavnið hjá tínum BVA?

**A.** Hóast vit hava avtalað, at tað er loyniligt, so fari eg kortini at avdúka navnið her – og bara her. Tað er: ____________________

**B.** Ikki ánilsi av tí, hví skuldi eg vitað tað?

**C.** Ja, tað er M-okkurt … ella var tað nú An … Hmm …

### 4 Hvørja stødd brúkar tín BVA í skóm?

**A.** Á, tað er lætt, vit brúka somu stødd í skóm, tað er: ____________________

**B.** Tað er undarligt, at eg skal vita tað

**C.** Eg giti bara, tað viðgangi eg. Tað er: ____________

### 5 Um tín BVA skuldi valt millum hesar tríggjar „frídagarnar", hvønn hevði hann so valt?

**A.** At farið í tivoli, vit tosa um russjibanar, fast food, candyfloss og spenning uttan íhald í ein heilan dag!

**B.** At farið ein gongutúr í hagan at hugt at blómum og skordýrum og havt ein góðan matpakka við

**C.** Bara verið saman við mær, tí eg eri tað perfekta selskapið

### 6 Tit skulu sova saman, hvønn týdningarmiklan lut hevði tín BVA tikið við heimanífrá?

**A.** Sína: ________. Hann/hon klárar ikki at sova uttan!

**B.** Sína eydnu- … øh, tannbust?

**C.** Hví skuldi hann/hon havt brúk fyri nøkrum heimanífrá,
EG ERI HEEEEEER?!

### 7 Tín BVA hevur føðingardag, hvørja kaku ynskir hann/hon sær?

**A.** Eina við hesum sniðinum: ____________________

**B.** Eina litríka kaku við nógvum ymiskum pynti og fleiri ymiskum smakkum (so er hon dekkað inn)

**C.** Ta kakuna, sum eg fekk á mínum føðingardegi í fjør, hann/hon plagar at herma (eg sigi tað bara)

### 8 Hvat STROK-blað er yndisblaðið hjá tínum BVA?

**A.** Tað var: ____________________

**B.** Eg sigi bara: Øll bløðini!

**C.** Hann/hon hevur ongantíð sagt mær tað, tað er ógvuliga løgið og eitt sindur illgrunasamt, nú eg hugsi meg um …

STROK